Fra: Durita Holm, durita75@hotmail.com
Dato: 13.02.01
Til: birgir@sosialurin.fo
Evni: VIKUSKIFTI

TELDUBRÆVIÐ

# - Føroyar, hvat er tað?

Tað er nógvur kavi úti, 10 minus stig, klárur himmal og stilli. Luftin kennist turr og kavin knirkar undir skónum. Eg eri á veg oman á universitetið, tað eru nú seks mánaðir síðan eg kom til Oslo og byrjaðið at lesa socialantropologi. Í dag eitur fyrilesturin: »Symbolbruk og erkjennelsesformer«. Ljóðar tað ikki áhugavert - ella?

Eg bleiv mangan bilsin, tá eg kom til Noregs. Eg helt, at norðmenn vóru rættuliga líkir føroyingum og tók tað sum eina sjálvfylgju, at nú fór eg endiliga at sleppa undan hesum eina spurninginum, sum altíð hevur fylgt mær, tá eg havi ferðast: »Føroyar, hvat er tað?«.

Eg ivaðist ikki í, at vit um ikki annað kundu tosa um Norðurlandaráðið, fiskiskap og kvotur í Barentshavinum. Eg kundi reypa eitt sindur um, hvussu tað var at vera við línubáti í Føroyum, og tá átti at verið lagamanni at fáa samband við hesar stirvnu norðmenninar.

Eg royndi meg í bussinum fyrstu vikuna. Eitt smíl og eitt eygnabrá, jú tað riggaði: »Hvor kommer du fra?« spurdi tann dámligi ungi maðurin, sum las biologi. »Fra Færøyene« svaraði eg stolt. »Hva sa du?« »Færøyene« segði eg ivandi, »Åh ja, hvor er det nu det ligger henne?«

Soleiðis er tað ofta her í Oslo. Tað nyttar einki at tosa um hvørki Norðurlandaráðið, ella fiskikvotur og tosk. Tað er líka ókent fyri teimum sum skerpikjøt í Sisilia.

Eg havi lagt til merkis, at í føroysku tíðindunum er næstan hvønn dag eitthvørt um Noreg, og eg vónaði tí av og á at hoyra Føroyar nevndar í fjølmiðlunum her. Men ak – tað kemur næstan ikki fyri. Eg kann staðfesta, at í Oslo eru Føroyar ikki serliga víðagitnar.

Oslobúgvar kunnu hesum viðvíkjandi býtast í tveir bólkar: tey, sum einki vita og eiheldur vilja vita nakað, og so tey, sum verða hugtikin og vilja vita meira. Vit hava t.d. ein undirvísara, ein antropologur, sum er serfrøðingur í Mongolia. Tá hon hoyrdi, at eg var úr Føroyum, bleiv hon púra vill, og fortaldi, at tá hon fyrstu ferð fór til Mongolia og gjørdi tað til sítt serøki, ivaðist hon í, um hon skuldi velja Føroyar ístaðin. Tí tær vóru so eksotiskar!

Eftirsum Føroyar eru ein av heimsins smæstu tjóðum, er tað okkara lagna, at vera antin ókend og óáhugaverd, ella ókend og eksotisk. Men okkum nýtist ikki at fella í fátt fyri tað, tí hetta er so relativt. USA verður jú hvønn dag nevnt í norsku fjølmiðlunum, men hvussu ofta verður Noreg umtalað í USA?

Ein dagin, tá eg hevði verið í Oslo nakrar mánaðir og ikki hitt ein einasta føroying, sá eg ein ungan mann í føroyskari skipstroyggju. Eg sá helst rættuliga desperat út, tá eg fór rennandi eftir honum og sjelaglað tók í hann og segði: »Hey hann sjálvur, eg eri av Sandi!«

Hann sá nokkso skelkaður út og bakkaði eitt sindur áðrenn hann físti: »Hva seyer du?«. Eg bað orsaka og fekk at vita, at troyggjan var keypt á loppumarknaði!

Hóast Oslobúgvanna svíkjandi Føroyakunnleika, so er her kortini gott at vera. Serliga kveikjandi er teirra brennandi áhugi fyri at vera úti í náttúruni. Hesa árstíðina er »ski« við í øðrum hvørjum setningi. Og sum tit kunnu ætla, so eri eg eftirhondini ælabogalitt um allan kroppin. Tí á skíøkinum er føroyski kunnleikin nevniliga so sum so.

**PENGAR OG FILMUR. Í Norðanlondum eru ætlanir um fleiri nýggjar og dýrar filmar. Norðmenn hava fingið avtalu við Gerard Depardieu, og íslendingar eru farnir at samstarva við kanadiarar um hetjukvæði »Beowulf«**

# Stórir filmar

FILMUR
*Birgir Kruse*

Franska stjørnan, Gerard Depardieu, fer at spæla við í filminum »Dinas bok«, sum byggir á kendu norsku skaldsøguna hjá Herbjørg Wassmo. Høvuðsleiklutin hevur tó norska Marie Bonnevie, sum vit kenna úr »Jerusalem« hjá danska Bille August.

Tíggju ár eru liðin, síðani skaldsøgan hjá Wassmo kom út.



Nú enskt mæltur filmur skal gerast úr søguni, verður tað Ole Bornedal, sum er ættaður av Bornholm, ið skal leikstjórna.

Samlaði kostnaðurin er mettur til 115 milliónir norskar krónur, sum skandinavar, týskarar og fransmenn skulu rinda.

Allar upptøkur verða gjørdar í Noregi, og staðurin Reinsnes, sum verður nevndur í bókini, verður lagdur til Kjerringøy, har upptøkur byrja í næsta mánaði, sigur Axel Helgeland, sum er leiðari í verkætlanini.

*Franski filmsleikarin Gerard Depardieu fær leiklutin sum Jacob í »Dinas bok«*

Í Íslandi hevur Fridrik Thór Fridriksson leitað fram tiltikna fornbretska kvæðið úr 8. øld, sum í 3200 ørindum sigur frá um hetjuna »Beowulf«. Írski Nobelvinnarin, Seamus Heany, hevur nýliga enduryrkt hetta drúgva kvæði í snotuligari bók.

Íslendski filmsleikstjórin Fridrik Thór, sum telist millum teir fremstu har í landinum, hevur sett seg í samband við Sturla Gunnarsson, sum býr í Kanada, men er av íslendskari ætt. Ætlanin er, at kanadiski íslendingurin skal leiksjórna, nú »Beowulf« verður gjørdur til film.

Eins og í norska førinum verður filmurin gjørdur á enskum máli, men allar upptøkur verða gjørdar í heimlandinum, Íslandi, sigur Fridrikkur. Farið verður undir upptøkurnar næsta ár, og ætlanin er at kendar filmstjørnur skulu verða við.

Kostnaðurin er settur til 15 milliónir kanadiskar dollarar, ella 840 milliónir íslendskar krónur. Hetta er dýrasti filmur, sum íslendingar eru við í. Filmsfeløgini hjá teimum báðum, Fridrikki og Gunnari, skulu fíggja »Beowulf« saman við Alliance Atlantis, sum er stórsta felag av sínum slagi í Kanada.

Mong lond hava gjørt tað til ein skattafyrimun hjá filmsfeløgum at fáa filmar tiknar í júst teirra landi. Teirra millum eru amerikansku statirnir, ið hava skipað »filmkommissiónir«, sum í prangandi tilfari lýsa heimrustina. Á henda hátt fæst ídnaðurin og mentanin at ganga hond í hond. Og í roynd og veru er filmur jú ein samanrenning av mentan og ídnaði.

Bæði norski Axel og íslendski Fridrik hava vitjað herheima. M. a. tá fyrsti spælifilmur Katrinar Ottarsdóttir, »Atlantic Rapsody«, varð frumsýndur í 1989. Og tá vit lesa hetta, hevur Katrin, higartil einasti útbúni filmsleikstjóri okkara, lagt fram nýggja verkætlan í Rotterdam. Vit krossa fingrar og ynskja henni blíðan byr.



*Íslendski Fridrik Thór Fridriksson hevur tikið stig til at gera film úr fornbretska kvæðnum »Beowulf«*

Eins og vit somuleiðis ynskja teimum góðan byr, ið leggjast afturat. Í danska blaðnum Aktuelt sigur filmsleikstjórin Carsten Fromberg, at skikkaðir umsøkjarar úr Føroyum eru millum tey 220, sum í hesum umfari vilja gerast filmsleikstjórar. Men bara seks sleppa inn. Carsten er ein teirra, sum ger av, hvørji tey verða. So eisini her senda vit góð ynski, filmi og landi at frama.




UNITED seafood

## KT-SAMSKIPARI

Av tí at KT-samskiparin hjá okkum fer í annað starv verður søkt eftir KT-samskipara til Føroya Fiskavirking, at byrja skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávurnar hjá KT-samskiparanum verða:**

- Dagligur rakstur av øllum KT-innleggingunum hjá P/F Føroya Fiskavirking, íroknað stuðul til allar nýtarar.
- Samstarv og samskifti við uttanhýsis KT-útvegarar.
- Saman við nýtarum at gera kravspecifikatiónir sum grundarlag fyri menning av skipanum.
- Dagføring av útgerð og skipanum.
- Útbúgving av nýtarum, serliga til Microsoft Office skipanir.

**Netskipanir:**
Allar deildir á Føroya Fiskavirking eru bundnar saman við einum felags netið, so at brúkarar og rættingi kunnu uppsetast á einum staði.

- Høvuðsskipan: Novell Netware
- Aðrar skipanir: Windows NT og Winframe
- Internet: Linux

**Felags forrit:**

- Bókhaldsskipan: Concorde XAL
- Framleiðsluskipanir: Marcl MPS, Com-Data skipanir
- Goymsluskipan: Plattaskipan (Com-Data),
- Klokkuskipan: Com-Data
- Lønarskipan: Com-Data
- Aðrar skipanir: Ymiskar Access databasur

**Teldur:**
Pc teldur við Win95/Win98 og Office97/2000.

**Krav er at umsøkjari hevur:**

- Kunnleika til og royndir við Novell Netware skipað lokalnet.
- Royndir við datasamskifti, eisini í samband við Internetið.
- Góðan kunnleika til Microsoft Office.
- Kunnleika til Concorde XAL er ein fyrimunur, men eingin treyt.

**Vit kunnu bjóða:**

- Eitt framkomið fakligt umhvørvi.
- Eitt virkið og framkomið framleiðsluumhvørvi.
- Møguleikar fyri persónliga menning og eftirútbúgving.
- Løn sambært avtalu.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Suna Joensen á tlf. 355555. Umsóknin skal sendast áðrenn 26. februar 2001 til

**UNITED SEAFOOD, P/F Føroya Fiskavirking**
Att.: Leivur Michelsen
Postboks 3183
FO-110 Tórshavn

Virkini liggja spjødd um alt landið, og tí er nakað av ferðing. Edv-deildin heldur til á høvuðsdeildini í Tórshavn. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi.



INPACT INTERNATIONAL

P/F Grannskoðaravirkið
*INPACT*
statsaut. revisorar

## Byggifrøðingur

Fyri ein kunda okkara, søkja vit eftir einum byggifrøðingi at byrja 1. mars 2001 ella skjótast gjørligt eftir hetta.

Talan er um eitt áhugavert fulltíðarstarv og fevnir um arbeiðsleiðslu bæði í Føroyum og uttanlands m.a.:

- leiða arbeiði á byggiplássum
- samskifti ímillum byggiánara og byggitakara
- ymiskar projekteringsuppgávur
- menna virki innan- og uttanlands
- annars alt vanligt arbeiði í hesum sambandi

Tað er avgjørt neyðugt, at umsøkjarin hevur góðan praktiskan og teoretiskan kunnleika til leiðslu og byggivirksemi, skrivi-, rokni-, tekni- og telduarbeiði. Tað hevur fyrimun, um umsøkjarin er útbúgvin innan timburfakið.

Fyri ein, ið kundi hugsað sær eitt sjálvstøðugt og fjølháttað arbeiði við góðum arbeiðsviðurskiftum og góðum persónligum menningarmøguleikum, er hetta tað rætta starvið, ið setur stór krøv til tann menniskjansliga og fakliga førleikan.

Løn eftir avtalu.

Hevur tú áræði, kann virka sjálvstøðugt, góð samstarvsevni og hevur hollar royndir innan byggiyrkið, við ástøðiligari útbúgving, eitt nú byggifrøðingur innan timburfakið, so ert tú tann, vit søkja.

Nærri fæst at vita við at ringja tlf. 31 47 00 og spyrja eftir Alva Nielsen ella Jógvani Amonsson.

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum og ummælum verður at senda *innan 20. februar 2001* til:

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
**statsaut. revisorar**
R. C. Effersøesgøta 26 · Postrúm 191 · FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 314700 · Telefax +298 313815
E-mail: Inpact@post.olivant.fo
www.inpact.fo


## Ráðstevna

**Almenn ráðstevna um yvirtøku av Skipaeftirlitinum verður í Útvarpshøllini mikudagin tann 21. februar kl. 09.30 til 15.30.**

Felagið Skipating skipar fyri ráðstevnu við tí endamáli at lýsa nærri hvussu skipaeftirlitið kann skipast og fáast at virka á føroyskum hondum.

Ráðstevnan verður skipað sum pallborðsfundur við luttøku av:

| | |
|---|---|
| **Halgir Winther Poulsen** | **Formaður í yvirtøkunevndini** |
| **Thormund Johannesen** | **Skipasmiðjur og ráðgevarar** |
| **Jákup Egholm Hansen** | **Reiðarar** |
| **Óli Jacobsen** | **Manningar** |
| **Torleivur Hoydal** | **Skipaeftirlitið í Føroyum** |
| **Ole Lauritsen** | **Klassafeløg** |
| **Gudmundur Gudmundson** | **Íslendska Skipaeftirlitið** |

Eftir framløguna verður orðaskifti har høvi er at seta spurningar.

**Jørgin Niclasen**, Landsstýrismaður setur ráðstevnuna. **Jógvan Arge**, útvarpsmaður verður orðstýrari. Ábit verður í steðginum á middegi.

Ráðstevnan er almenn og øll við áhuga fyri evninum eru vælkomin.


Lesið Sosialurin -tað loysir seg



KIA CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel16 V, 126 HK, 5 hurðar



Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.
D. B. Bilar
Tel. 310 600